

# Cairn letur aftur í Grønlandi

D
**Jan Müller**

15.05.2014 - 14:06

Oljan.fo

Skotska oljufelagið Cairn Energy hevur valt at lata skrivstovuna í Nuuk aftur. Tað merkir kortini ikki, at felagið hevur slept dreyminum um tað svarta gullið, men av tí at eingin boring er á skránni fyribils, heldur felagið tað ikki vera skilagott, at skrivstovan í Nuuk er opin.

Cairn Energy hevur gjørt greitt, at felagið fer ikki at bora í Grønlandi í ár, og tí letur skrivstovan aftur í seinasta lagi um tríggjar mánaðir.

Tvey fólk hava arbeitt á skrivstovuni, og tey noyðast nú at finna sær okkurt annað at gera.

Cairn Energy sigur við grønlendska kringvarpið KNR, at felagið hevur avgjørt ikki slept Grønlandi. Tvørturímóti hevur felagið framvegis góða vón um at fáa nakað burtur úr Pitu-leiðini úti fyri Útnyrðingsgrønlandi